# Løgmaður vendir aftur til eitt landsstýri í kreppu



*Løgmaður vendi gjáramorgunin aftur til eina stjórnarkreppu. Her koyrir Anfinn Kallsberg úr Norrønu klokkan 6.48 gjáramorgunin.*
*Mynd: Finnur Justinussen*

**Gjáramorgunin kom løgmaður aftur til landið, eftir at hava verið staddur í Danmark í feriu. Seinastu vikuna hevur politiski leikpallurin í Føroyum bíðað spentur eftir, hvat Anfinn Kallsberg fer at svara aftur til tær álvarsligu skuldsetingar, sum Tjóðveldistingmaðurin Tórbjørn Jacobsen alment hevur reist ímóti honum.**

HEIMKOMAN
*Rúnar Reistrup*

Mánamorgunin klokkan 6.48 koyrdi løgmaður av Norrønu á land á Bursatanga í Havn. Hóast arbeiðspláss hansara á Tinganesi liggur eitt hanagleiv harfrá, hevði løgmaður ongar ætlanir um at fara inn á gólvið á skrivstovu síni beinanvegin.

- Nú fari eg fyrst og fremst heim til Viðareiðis, segði løgmaður, tá vit hittu hann ígjøgnum opna bilrútin, meðan bilurin spakuliga koyrdi framvið Tollvaldinum.

Løgmaður vendir heim til eina ta verstu samgongukreppuna í síni góðu fýra ár í embætinum, nú Tórbjørn Jacobsen, tinglimur Tjóðveldisfloksins, meðan løgmaður var burturstaddur, alment hevur ákært hann og fiskimálaráðharran fyri at hava havt ov langar fingrar.

Nú løgmaður vendi heim aftur á klettarnar, eftir at hava hildið feriu á flatlondum, fær hann lítlan frið at pakka kuffertið út, tí tað, sum byrjaði sum ein ósemja um einskiljingarmál hevur ment seg til eina stjórnarkreppu fyri mannin í landsins leiðandi politiska embæti.

### Ikki standa ósvaraðar

Fyri lítlari viku síðan segði løgmaður, sum tá var staddur í Danmark á feriu, at skuldsetingarnar hjá Tórbirni Jacobsen ikki sluppu at standa ósvaraðar. Tá vóru boðini frá løgmanni tey, at hann vildi vita, um tað var Tjóðveldisflokkurin sum heild, ella bert Tórbjørn Jacobsen sum einligur svali, ið stóð aftanfyri skuldsetingarnar.

Løgmaður visti tá ikki at siga, um hetta fór at fáa avleiðingar fyri samgonguna.

Síðan tá hevur ein leiðandi advokatur staðfest, at løgmaður hevur grundarlag fyri at stevna Tórbirni Jacobsen fyri ærumeiðing, og tveir fyrrverandi løgmenn hava gjørt greitt, at embætið, sum Anfinn Kallsberg røkir, krevur av honum, at hann reinsar seg fyri skuldsetingarnar so ella so.

### Fámæltur løgmaður

Síðan Tórbirni Jacobsen, í viðmerking týsdagin, legði løgmann undir ikki at hava kent mun á sínum og annra, hava hvørki formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, ella maðurin handan viðmerkingina ynskt at gjørt viðmerkingar, hóast fjølmiðlarnir hava verið í hølunum á teimum líka síðan.

Tá løgmaður vendi aftur til landið gjáramorgunin var hann heldur ikki nógv fyri at tosa um málið.

- Tað fyrsta eg fari at gera, verður at seta meg inn í alt tað, sum er sagt og skrivað um hesar skuldsetingarnar. Eg verði noyddur at seta meg ordiliga inn í málið áðrenn eg kann gera viðmerkingar til tað, segði løgmaður, áðrenn hann legði leiðina til Viðareiðis.

Í februar mánað í fjør vendi Løgmaður eisini heim til eitt Føroyar í stjórnarkreppu, tá Høgni Hoydal, táverandi landsstýrismaður við sjálvstýrismálum, av sínum eintingum bar eitt uppskot um fólkaatkvøðu um sjálvstýrisleist samgongurinnar í tingið, meðan løgmaður var staddur í London.

Tá var um tað reppið, at samgongusamstarvið varð uppsagt.






# Skeyt eftir løgregluni

**Um middagsleitið leygardagin byrjaði ein 39 ára gamal maður at skjóta eftir løgregluni á Sundsvegnum í Havn. Eingin fekk skaða og ein tíma eftir yvirgav maðurin seg til løgregluna**

SKOTDRAMA
*Ingrid Bjarnastein*

Maðurin, sum var fullur, ringdi sjálvur til løgregluna um middagsleitið og hótti við at taka lívið av sær og øllum, sum komu í nánd, visti Útvarp Føroya at siga leygarkvøldið.

Ein, sum hevur sæð tilburðin greiðir frá, at maðurin gekk fleiri ferðir og mól aftur og fram inn í húsini á Sundsvegnum.

### Lumpaði

Aðru ferð 39 ára gamli maðurin kemur út úr húsunum, leggur hann byrsuna á vegin, og stingur hendurnar upp í loft, sum ætlar hann at yvirgeva seg. Men tað gjørdi hann als ikki. Løtu seinni tekur hann byrsuna uppaftur og byrjar at sikta eftir løgregluni, sum tá hevði umringað mannin.

Maðurin var rættiliga óður og harðligur, og hann smekkaði byrsuna í ein hegnpela, og hetta gjørdi so, at byrsan brotnaði. Hann fer innaftur í húsini, men tá hann so triðju ferð kom út, legði hann aftur byrsuna á vegin og yvirgav hann seg síðani til løgregluna.

Eisini lat maðurin eitt skot móti løgreglubilinum, har tveir løgreglumenn og eitt vitni krógvaðu seg.




### Varðhaldsfongslaður

Sunnudagin kom maðurin fyri í grundlógaravhoyring. Hann varð millum annað skuldsettur fyri, at hava hótt tænastumenn í yrki og sivil fólk, og ákæruvaldið kravdi, at maðurin varð varðhaldsfongslaður.

Í hesum hevur ákærduvaldið fingið viðhald, tí byrsumaðurin varð varðhaldsfongslaður í 12 dagar. Hann mótmælti ikki avgerðina hjá rættinum. Av tí, at ein sjónbandaupptøka er gjørd, og eitt vitni var á staðnum, styrkir hetta illgrunan um, at tann 39 ára gamli maðurin er sekur í skuldsetingunum, sigur rætturin.

Fyribils er maðurin skuldsettur fyri trý brot á revsilógina. Millum annað fyri at hava siktað fleiri ferðir eftir løgregluni og fyri at skjóta eftir henni og vitnunum.

Harafturat er hann skuldsettur fyri at koma fólkunum í grannalagnum í vanda, tá hann skjeyt eftir løgregluni, men maðurin noktar seg sekan í øllum skuldsetingunum.

Nú er maðurin varðhaldsfongslaður, tí soleiðis fær hann ikki órógvað kanningararbeiðið hjá løgregluni.

*Løgreglufólkini krógvaðu seg, tá maðurin byrjaði at skjóta eftir teimum.*




# Pison liðugur í august

**Pison verður ikki at kenna aftur, sigur Petur Eliassen, skipari. Hann er í Hirtshals saman við familjuni. Meiningin var, at Petur skuldi koma upp aftur til Føroyar við Pison, men hann verður ikki liðugur fyrr enn einaferð í august**

UMVÆLING
*Solby A. Eliasen*

Pison liggur í Hirtshals og henda dagin, tá Sosialurin tosaði við Petur stóð hann beint við síðuna av bátinum.

- Ongin í Klaksvík hevði kent bátin aftur um onki navnaskeltið var á honum, sigur Petur avgjørdur á málinum.

- Hann er sera snøggur. Alt er gjørt av nýggjum. Tað er so at siga bara skrokkurin eftir av honum, so tað verður sum eitt nýtt skip, sigur Petur.

Øll tólini eru nýggj á brúnni og alt er skift út eisini. Ongin fer at sova har frammi í bátinum longur. Tað eru sekstan koyggjur har afturi í bátinum nú.

Pison verður, sum sagt, væntandi klárur í august.



# Klagaður fyri at veittra við Merkinum í Hirtshals

**Petur Eliassen úr Klaksvík er staddur saman við konuni og einari dóttur í summarhúsi í Hirtshals. Uttanfyri er ein flaggstong og Petur vant sjálvandi tað føroyska flaggið upp. Men tað fekk ilt í ein granna, sum ikki gjørdi mætari enn at klaga**

SUMMARFRÍ
*Solby A. Eliasen*

Petur sigur, at tey hugsaðu ikki um, um tað mundi vera loyvt at flagga við tí føroyska flagginum ella ikki, tá tey vundu Merkið upp hendan dagin í Hirtshals.

- Serliga tí, at vit hava verið her einaferð fyrr í summar, og tá veittraði Merkið hvønn dag uttanfyri summarhúsið, uttan at vit vórðu klagað, sigur Petur og tað er ikki sørt, at hann hevur hug at flenna at hesum.

Tað var, sum sagt, ein granni, sum klagaði um, at tað føroyska flaggið veittraði í Hirtshals hendan dagin.

Ein annar maður, sum eisini hevði summarhús tætt við har, sum Petur og familjan búgva, kom við eini reglugerð til Petur, sum hann so las í gjøgnum.

- Maðurin var bæði vinarligur og blíður, og vit flentu bert at hesum. Men eg var noyddur at taka flaggið niður, kortini. Hann spurdi, um tað var nøkur serlig orsøk til, at føroyska flaggið veittraði hendan dagin, og eg segði bara, at tað var tí, at vit eru føroyingar, greiðir Petur frá.

Í hesi reglugerð stóð millum annað, at tað er ikki loyvt at veittra við fremmandum flaggi í Danmark uttan serloyvi.

Um talan er um eitt flagg, sum ikki er í so góðum standi og tað verður noktað at taka tað niður, so kann tað verða tikið niður av rætta viðkomandi og verða brent, stóð eisini at lesa í reglugerðini.

At enda stóð eisini at, um ein ynskir at veittra við einum fremmandum – í hesum førinum føroyskum - flaggi í Danmark, so skal tað danska flaggið vera oman fyri.

- Men tað tímdi eg ikki, tí so hevði eg rokkið upp at nomið við tað, sigur Petur stórflennandi og leggur aftur at, at tá maðurin við reglugerðini var farin, tá vant hann bara tað danska flaggið upp og lat tað veittra í hálvan annan tíma, áðrenn hann tók tað niðuraftur. Sum eitt plástur á sárið til grannan, sum hevði fingið ilt onkunstaðni av tí føroyska flagginum.

Nú og frá og inntil Petur og familjan fara upp aftur, fer so onki flagg at veittra uttan fyri summarhúsið í Hirtshals.

Petur er skipari á Pison, sum er undir umfatandi umvælingum í Hirtshals. Meiningin var, at Petur skuldi fara upp aftur við Pison, men hann verður ikki klárur reiðiliga enn, so Petur flýgur uppaftur, meðan konan og dóttirin fara upp við Norrønu leygardagin.